# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 25.11.2019*

**Bygdaráðsfundur 25.11.2019 kl. 18.00 til kl. 18.20**

| | | |
|---|---|---|
| **Fundarstað:** | **Fundarhøli** | |
| **Hjástødd**: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Selma Hansen. skrivari | forfall |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 107/2019 Fíggjarætlan 2020 – 3. viðgerð**

J.nr. 32102-2-2019

**Málslýsing**

Fyrsta viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2020 var fyri á bygdaráðsfundi tann 30.09.2019, og onnur viðgerð tann 07.11.2019.

Tann 14.11.2019 er í teldiposti komin seinna metingin frá Fíggjarmálaráðnum uppá eftirlønarinngjøld og flyting vegna Dis, Fas og frádráttir. Ein meirinntøka á tkr. 91 er innroknað við 3. viðgerð, annars er eingin onnur broyting ímun til 2. viðgerð.

**Fíggjarnevndin mælir til, at høvuðstølini til triðju viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2020, hjá Nes Kommunu, eftir broytingar vera hesi:**

| **Rakstur tkr.** | **2020** | **2019v/eykaj.** | **Munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristing | 5.220 | 4.788 | 432 | 9,0 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 18.171 | 17.185 | 986 | 5,7 |
| §3 Børn og ung | 11.889 | 11.215 | 674 | 6,0 |
| §4 Undirvísing | 4.153 | 3.890 | 263 | 6,8 |
| §5 Mentan og frítíð | 4.046 | 3.795 | 251 | 6,6 |
| §6 Teknisk mál | 4.597 | 4.288 | 309 | 7,2 |
| §7 Kommunalt øki | 3.332 | 3.302 | 30 | 0,9 |
| **Rakstur í alt** | **51.408** | **48.463** | **2.945** | **6,1** |
| | | | | |
| **§20 Inntøkur v.m.** | **60.455** | **54.796** | **5.659** | **10,33** |
| | | | | |
| **Úrslit áðrenn íløgur** | **9.047** | **6.333** | **2.714** | **42,9** |

| **Íløgur tkr.** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyrisiting | 0 | 0 | 0 | 0,0 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 1.489 | 141 | 1.348 | 956,0 |
| §3 Børn og ung | 7.800 | 5.000 | 2.800 | 56,0 |
| §4 Undirvísing | 750 | 1.102 | -352 | -31,9 |
| §5 Mentan og frítíð | 2.060 | 2.068 | -8 | -0,4 |
| §6 Teknisk mál | 4.103 | 5.700 | -1.597 | -28,0 |
| §7 Kommunal virki | 2.853 | 9.030 | -6.177 | -68,4 |
| **Íløgur í alt** | **19.055** | **23.041** | **-3.986** | **17,3** |
| | | | | |
| **Úrslit aftaná íløgur** | **-10.008** | **-16.708** | **-6.700** | **-40,1** |
| | | | | |
| **Afturgjald av skuld** | **3.223** | **3.910** | **-687** | **-17,6** |
| | | | | |
| **Lántøka** | **14.000** | **11.000** | **3.000** | **27,3** |

**Tilmæli**
Á fundi 18.11.2019 mælir Fíggjarnevndin til, at skattaprosentið verður óbroytt 20,5%, og at barnafrádrátturin verður óbroyttur kr. 5.500.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Tilmæli**
Á fundi 18.11.2019 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við triðju viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2020 soleiðis, sum hon er uppsett. Afturgjald av skuld tkr. 3.223 verður fíggjað við rakstraravlopið. Íløgurnar á tkr. 19.055 verða fíggjaðar við rakstraravlopið á tkr. 5.055 og lántøku á tkr. 14.000.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt**.**

**Mál nr. 108/2019 Áheitan um uppíbygging í egningaskúr - 2. Viðgerð**
J.nr 8207002-1-2019
**Málslýsing**
Tann 23. apríl 2019 kemur skriv til bygdaráðið frá Rúna í Hjøllum, sum umboðar útróðrarbátin MB Heidi. Vegna plásstrot søkja teir um, at bygt verður uppí tann sunnasta skúrin.

Tekniska nevnd hevur kannað ymiskar møgurleikar, fingið gjørt kostnaðarmetingar og biðið um tilboð uppá at byggja uppí.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 25.11.2019*

Nes kommuna hevur fingið tilboð uppá uppíbygging, áljóðandi 103.296 kr., uttan mvg. Tilboðið er íroknað tilfar, timbur- og stoypiarbeiði.

Máling, innlegging av el og vatn er ikki íroknað. Kostnaður av hesum er mettur til 20.000 kr. uttan mvg.

**Tilmæli**
Á fundi 04.11.2019 mælir Tekniska nevnd til at taka av tilboðnum, at arbeiðið kann setast í verk, og at umsøkjarin málar bygningin innan og uttan.

**Avgerð**
Á bygdaráðsfundinum 07.11.2019 var tilmælið hjá Teknisku nevnd einmælt samtykt og samtykt var, at peningurin skal takast av tøkum peningi.

Súni í Hjøllum var úti, tá málið var viðgjørt.

**Tilmæli**
Á fundi 18.11.2019 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av játtanini til uppíbygging av egningaskúri.

Súni í Hjøllum var úti, tá málið var viðgjørt.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt við aðru viðgerð.

Súni í Hjøllum var úti, tá málið var viðgjørt.

**Mál nr. 109/2019 Nevndarvikur og Bygdaráðsfundir 2020**

J.nr. 22022-1-2019

**Málslýsing**
Kommunan skal áseta og lýsa teir almennu bygdaráðsfundirnar fyri komandi ár. Undanfarna ár vóru bygdaráðsfundirnir mánadagar kl. 18.00.
Uppskot til bygdaráðsfundirnar í 2020, sum verða 10 í tali, eru:

Mánadag 27. januar
- 24. februar
- 30. mars
- 27. apríl
- 25. mai
- 29. juni
- 31. august
- 28. september
- 26. oktober
- 30. november

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 25.11.2019*

**Nevndarfundirnir í 2020 eru í viku:**
3-7-12-16-20-25-34-38-42-47

**Tilmæli**
Á fundi 18.11.2019 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við, at bygdaráðsfundirnir fyri 2020 verða, sum ásett omanfyri.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 110/2019 Reguleringar til fíggjarætlanina 2019**
J.nr. 32102-3-2018
**Málslýsing**
Reguleringar á fíggjarætlanini 2019 – fyrsta viðgerð.

Fyrisitingin hevur gjøgnumgingið raksturin higartil í ár, framroknað alt árið 2019 og samanborið við løgdu fíggjarætlanina fyri 2019. Fyrisitingin mælir til fylgjandi reguleringar á fíggjarætlanini fyri 2019:

| **Rakstur** | **tkr.** |
|---|---:|
| §1 Kommunal Fyrisiting | -25 |
| §2 Almanna- & Heilsumál | 77 |
| §3 Børn & Ung | -76 |
| §5 Mentan & Frítíð | -120 |
| §6 Teknisk mál | 10 |
| §7 Kommunal virki | 112 |
| **Rakstur í alt** | **-22** |
| | |
| **Íløgur** | |
| §2 Almanna- & Heilsumál | -23 |
| §5 Mentan og Frítíð | 78 |
| §6 Teknisk mál | 257 |
| §7 Kommunalt virki | -100 |
| **Íløgur í alt** | **212** |
| | |
| Rentustuðul og rentuútr. | -190 |
| | |
| **Úrslit av reguleringum** | **0** |

**Tilmæli**
Á fundi 18.11.2019 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við reguleringunum á fíggjarætlanini fyri 2019.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 25.11.2019*

**Mál nr. 111/2019 Umsókn um byggiloyvi til sethús**

J.nr. 234022-28-2016

**Málslýsing**

Tann 6. november 2019 kom umsókn frá Alomu og Katalin Galiceanu, har tey søkja um byggiloyvi til sethús. Húsini eru í 2 hæddum: Kjallarahædd og stovuhædd, við flatari tekju. Eisini verður opið carportur partur av húsinum.

Staðsetingin er niðanfyri vegin við Lýðarsvegin, matr.nr. 474w.

**Tilmæli**

Á fundi 12.11.2019 mælir Tekniska nevnd til at geva byggiloyvið sambært viðløgdu tekningum frá Hmp consult dagf. 07.05. 2019.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmætl samtykt.

**Mál nr. 112/2019 Umsókn um byggiloyvi til trafohús**

J.nr 234022-38-2019

**Málslýsing**

22. oktober 2019 kom umsókn frá JT eletric vegna Bakkafrost um byggiloyvi til eina trafostøð. Tílíkar støðir vera brúktar frá streymforsýningini hjá SEV, og víðari til brúkarin.

Hendan støðin skal brúkast í sambandi við streymveiting til aliflakan út fyri Nes, og staðsetingin av støðini verður sunnanfyri vendiplássi niðri á For.

**Tilmæli**

Á fundi 12.11.2019 mælir Tekniska nevnd til at geva byggiloyvið treytað av, at avvarandi mynduleikar eisini geva sítt viðmæli.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.